## VEÐRIÐ




**Fríggjadagin**
Strúkur í vindi til skrið, 13-20 m/s, men um náttina linkandi niður í stívt andøvsgul til hvassan vind, 10-15 m/s. Skýggjað og ælaveður og seinni regn. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Leygardagin**
Stívt andøvsgul til hvassan vind, 10-15 m/s, men minkandi niður í gul til stívt andøvsgul, 5-10 m/s. Skýggjað og regn. Um kvøldið og um náttina verður andøvsgul til strúk í vindi av útsynningi, 8-13 m/s, og skiftandi skýrák við ælaveðri. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Sunnudagin**
Andøvsgul til strúk í vindi av útsynningini og vesturni, 8-13 m/s, men sum fráliður linkar hann vindin. Skiftandi skýrák við ælaveðri. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Mána- og týsdagin**
Gul til stívt andøvsgul av vesturi, 5/10 m/s, men sum fráliður snarar hann í ein sunnan og linkur vindin til lot ella andøvsgul, 3-8 m/s. Skiftandi skýrák og sum fráliður reng ella ælaveður. Hitin millum 2 og 7 stig.

# Millum tey allarbestu

**Í eini greining av partabrævamarknaðinum metir the Daily Telegraph, at Faroe Petroleum er millum seks tey mest áhugaverdu á marknaðinum í 2008-01-03**

ÍLØGUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

2008 verður árið, har virksemið hjá Faroe Petroleum seinastu fimm árini fer at geva avkast til íleggjararnar. Somikið greiður er boðskapurin hjá the Daily Telegraph, sum í grein í blaðnum í gjár hevur gjørt sínar metingar um, hvørji feløg verða sonevndu hæddarloypararnir á enska virðisbrævamarknaðinum í 2008.

Samanlagt eru á leið 3.000 feløg skrásett á enska marknaðinum, so tað sigur ikki so lítið um vónirnar fyri føroyska oljufelagið, tá tað verður nevnt millum seks tey bestu íløguevnini hetta komandi árið. Og tað ger ikki skoðsmálið verri, at tað er virda Daily Telegraph, sum gevur skoðsmálið.



*Roknað verður við, at talan verður um nógvar positivar meldingar frá Faroe Petroleum til virðisbrævamarknaðin í 2008*

### 26 boringar

Sum grundarlag fyri sínum metingum sigur enska blaðið, at oljan heilt víst verður ein av teimum vørunum, sum heimurin framhaldandi hevur tørv á í 2008. Og við prísum, sum nú eru farnir upp um teir 100 dollararnir fyri tunnuna verður lønsemið í vinnuni neyvan verri.

Víst verður á, at felagið við seinastu kapitalhækkanini (£45 mió) hevur brynjað seg til komandi boringarnar, har felagið er við í ikki færri enn 26 boringum komandi tvey árini. Og við einum væl spjaddum íløguvága í sínum leitingarloyvum verður roknað við, at talan verður um fleiri positivar meldingar til marknaðin í 2008. Nakað sum helst fer at geva tað, sum blaðið nevnir »superior shareholder returns«.

Kursurin á partabrævinum hjá Faroe Petroleum hækkaði góð 6% í gjár.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -21 |
| Nuuk | -14 |
| Qaqortoq | -14 |
| Ammassalik | -10 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 8 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 2 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | -9 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | -11 |
| Bukarest | -4 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 3 |
| Róm | -- |
| Malorca | 13 |
| Athen | 10 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 5 |
| New Dehli | 15 |
| Bangkok | 26 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 9 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 31 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Veðurlagið**
Eitt sera høgt hátrýst eystan fyri Finnland liggur nærum stilt. Eitt látrýst sunnan fyri Ísland flytur seg norðureftir, og hetta ber ælaveður við sær til Føroya.



Fríggjadagin førkar eitt djúpt lágtrýst í ein útsynning úr Íslandei seg móti Føroyum. Sunnudagin er látrýstið heilt nær oyggjunum, áðrenn tað aftur ferðast móti norðuri.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 01/01 kl. 06⁰⁰ – 02/01. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8°
Minsti hiti máldur í januar: ° - Mesti hiti máldur í januar: °

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 01/01 kl. 06⁰⁰ – 02/01. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 2 mm




Alt um harmonikur

www.simme.eu

## VESTFALLSKYRRINDI

31. des Seinna kvarter
2. jan Jørðin næst sólini
3. jan Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. jan. | 01.58 | 14.19 | 00.58 | 13.19 | 01.13 | 13.34 | 03.58 | 16.19 | 04.58 | 17.19 | 00.13 | 12.34 | 11.34 | 23.55 | 02.13 | 14.34 | 03.13 | 15.34 | 01.43 | 14.04 | 02.58 | 15.19 |
| 3. jan. | 02.40 | 15.02 | 01.40 | 14.02 | 01.55 | 14.17 | 04.40 | 17.02 | 05.40 | 18.02 | 00.55 | 13.17 | - | 12.17 | 02.55 | 15.17 | 03.55 | 16.17 | 02.25 | 14.47 | 03.40 | 16.02 |
| 4. jan. | 03.22 | 15.43 | 02.22 | 14.43 | 02.37 | 14.58 | 05.22 | 17.43 | 06.22 | 18.43 | 01.37 | 13.58 | 00.37 | 12.58 | 03.37 | 15.58 | 04.37 | 16.58 | 03.07 | 15.28 | 04.22 | 16.43 |
| 5. jan. | 04.05 | 16.27 | 03.05 | 15.27 | 03.20 | 15.42 | 06.05 | 18.27 | 07.05 | 19.27 | 02.20 | 14.42 | 01.20 | 13.42 | 04.20 | 16.42 | 05.20 | 17.42 | 03.50 | 16.12 | 05.05 | 17.27 |
| 6. jan. | 04.50 | 17.14 | 03.50 | 16.14 | 04.05 | 16.29 | 06.50 | 19.14 | 07.50 | 20.14 | 03.05 | 15.29 | 02.05 | 14.29 | 05.05 | 17.29 | 06.05 | 18.29 | 04.35 | 16.59 | 05.50 | 18.14 |